


# Kirkjugarður

á Svínaryggi

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



### Ísak Næs:

# Fekk ein kolskuffu í høvdið og doyði

**Vit hoyra mest um vanlukkur á sjónum. Ísak Næs slapp undan eini vandaferð á sjónum, men doyði undir kolalossing**

Ísak Næss var føddur 10.mai 1869 á Giljanesi í Miðvági. Pápin var Christian Jensen, sonur Janus á Nesinum, og mamman var Marianna Isaksen, ættaður úr Eirikshúsi í Mykinesi. Ísak var elstur av fýra børnum. Hini vóru Jóan Pauli f. 1873, Anne Sophie f. um 1877 og Olevine Christine Marire, f. um 1879, búsett í Vági.

Ísak giftist í ár 1900 við Christinu Catrinu Sofíu Rubeksen. Hon var dóttir Petru Malenu Solmunde f. 1839 og Joen Christian Rubeksen f. 1842. Petra var systir Peter Hans Sørensen úr Søldarfirði, sum var umrøddur í hesi greinarøð fyri kortum. Jógvan var elsti sonur Rubek Heinesen, gamla Rubekk.

## Skuldu til Suðuroyar, endaði Orknoyggjunum

Ísak fekk 18 ára gamal ein rættiliga buldrutan túr til skips. Tann 7. august 1887 fór »Kate« hjá Godtfred Heinesen í Miðvági suður á Trongisvág. Manningin var Stoffa Kristian, skipari, Tummas Thomassen og Ísak. Ferðamenn við vóru Jón Effersøe, amtslækni, og Petur Johannesen úr Havn.

Men »Kate« kom ikki vegin fram til Suðuroyar. Hetta skapti stóran ótta fyri skipinum, og tað varð ein stór leiting sett í verk. Fyrst við at fara til Nólsoyar vita, um skipið sást í kikara, síðan varð leita við bátum og skipum. Alt uttan úrslit. Síðan varð »Magic« sent til Hetlands at vita, um tey vistu nakað har.

Tann 22. august kemur Magic aftur við góðum tíðindum. »Kate« var var komin til Orknoyggjarnar í øllum góðum eftir ein buldrutan túr, og »Magic« hevði manningina heim við.

Ísak tók skiparaprógv hjá Jens Mohr í 1895. Fyrsta skipið hann mundi føra var »Dart« hjá Hans Marius á Tanganum í Kollafirði summarið 1895.

Ísak kom til Føroya við »Daggry« í februar 1897 og førdi hana til fiskiskap árið at enda. Seinni førdi hann »Surprise« hjá Restorffs handli í sigling innanoyggja 1910-14.

## Doyði undir kolalossing

Men Ísaki varð ikki langt lív lagað, sum tað sæst í hesi minningargrein, sum Poul Niclasen skrivaði í fráhaldsblaðnum Dúgvan fyri apríl 1915:

Et sørgeligt og heldigvis herhjemme saa at sige enestaaende Ulykkestilfælde, berøvede den 9. april Thorshavns Totalafholdsforening et af dens ældre og mest sympatiske Medlemmer, idet Isak Næs under losningen af Kul fra Dampskibet Fenris ramtes i Hovedet af en tom Kulbalje, der under nedhejsningen i Lasten slog mod Lugekarmen og dermed gled ud af Krogen. Han døde med det samme.

Isak Næs, der var slægtet fra Vaagø og gift med en datter af Joen Rubeksen her i Byen efterlader sig Enke og 6 uforsørgede Børn, af hvilke det ældste opholder sig paa Døvstummeinstituttet i Danmark.

Det er altid tungt for de efterlevende, naar Døden har haft Bud efter ens kære, og dobbelt tungt og knusende maa det føles for Enken og Faderløse Børn i et tilfælde som dette, hvor Manden sund og rask om Morgenen forlader Hjemmet for at gaa til sin daglige gerning, og saa et par Timer senere ikke længere er blandt de levendes Tal.

Som den gode, tænkende og omsorgsfulde Familiefar, var Isak Næs saavel Medlem af den danske som den færøske Ulykkesforsikringsforening. Han var ogsaa Medlem af Thorshavns Afholdssygekasse og Thorshavns Totalafholdsforenings Begravelseskasse.

Isak Næs indmeldte sig i Thorshavns Totalafholdsforening den 11. April 1898, og han har siden uafbrudt været medlem af Foreningen. Afdøde var en af dem, der hyppigst besøgte Afholdsforeningens Lokale. Saavel til Møder og Generalforsamlinger som til almindelige Mødedage var man næsten altid sikker paa at træffe Isak Næs, og da han havde noget ejendommeligt vindende og tiltalende Væsen, følte man sig med det samme tiltrukket af denne brave og grundhæderlige Mand, der altid var stille og beskeden i sin Optræden, altid venlig og hjælpsom. Der blev her som overalt sat stor pris paa ham, og han tidlige Bortgang (han blev kun 45 Aar gammel) føles derfor som et stort Savn af os, der saa ofte kom i berøring med ham. Fred være med hans Minde!

## Jarðarferð í 1915

At Isak Næs var almindelig afholdt, saa man bedst af det store Ligfølge, der viste ham den store Ære ved at følge ham til det sidste Hvilested.

Fra Hospitalet blev Kisten pr. Baad ført ind til Frederiksvaag (Vágsbotn), og derfra først baaret til afdødes Hjem, hvor Sørgehøjtideligheden formede sig som et gribende Sørgedrama. Pastor Joensen talte her smukke Mindeord om den Bortgangne, ham, der saavel ude som inde i sit Hjem var den stille, pligtopfyldende Mand, der i Kærlighed og Omhu hjalp sin elskede Hustru at bære Hjemmets Byrder og saavel i Medgang som Modgang havde været en tro og kærlighedsfuld Ægtefælle. Den afdøde havde været en gudfrygtig Mand, der i Bønnen under Livets Prøvelser havde søgt sin tilflugt hos Herren.

Det var et gribende og hjerteskærende syn at se den fortvivlede Hustrus sorg, da Kisten bares ud fra Hjemmet, hvilket hun selv var for svag til at kunde forlade.

Fra Hjemmet bares kisten til Kirken, som næsten var fyldt til sidste Plads af det store Ligfølge. Her talte pastor Joensen og et Sangkor foredrog smukt et Par til Lejligheden særlig passende Salmer.

I Ligfølget lagde man særlig Mærke til afdødes gamle Fader, der forlængst har naaet Støvets Aar, og hvem Sorgen over Sønnens pludselige Død havde nedbøjet og sønderknust.



*Jógvan Næs á grøvini hjá ommu síni Katrinu Næs*



*Katrina Næs f. Rubeksen f. 24.7.1876 d. 31.12.1945*



*Ísak Næs f. 10.5.1869 d. 9.4. 1915*

## Børnini hjá Katrinu og Ísak vóru:

**Christian Martin (1902-1926)**, sum var á deyvastovni í Danmark
**Joen Christian Mourits (1903-1916)**, doyði í Hoydølum
**Petra Isaline Sofia (1908-2006)**, gift við Ernst Meinhard Joensen f. 1907
**Jens Karl Engelbrekt (1909-1995)**, giftur við Kristinu f. Schrøter úr Hvalba
**Valborg (1911-2004)**, ógift
**Richard (!913-1995)**, prentari, giftist við Johonnu Sofíu Jacobsen av Kirkju
**Isa f. 1915** eftir at pápin var deyður. Gift við Herman Joensen úr Mykinesi. Hon er einasta av systkunum sum er á lívi.

Hetta hevur sjálvsagt verið hart hjá Katrinu. Men, sum ofta var, fekk hon góða hjálp. Ein sum hjálpti var C.C. Danielsen, sparikassastjóri, sum rindaði lánsgjald fyri hana.

Ísak og Katrina eru jarðað í hvør síni grøv. Tað sæst einki til hansara grøv. Hennara sæst, men hon hevur tó ikki gravstein.

*Keldur:*
*Jógvan Næs*
*Føroya Siglingarsøga*



*Fimm av børnunum hjá Katrinu og Ísak Frá vinstru: Rikard, Jens, Petra, Isa og Valborg*

**Í komandi parti**

verður greitt frá Magnus Sivertsen Simonsen, ættaður úr Haraldssundi, sum í mong ár var gravari í gamla kirkjugarði